


*Reyðu klaksvíksstjørnurnar steðgaðu sigursrøðini hjá Tjaldur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Soleiðis steðgar tú Tjaldur

**HONDBÓLTUR** Tú skal vera til reiðar frá byrjan, vera sannførandi í verjuspælinum, og skjótálopini skulu vera fyrimyndarlig. Tá vinnur tú á Tjaldur, sigur venjarin hjá Stjørnuni. Sigursrøðin hjá kvinnunum hjá Runavík steðgaði í gjár

Uni Holm Johannesen

Svein Rógvi Nielsen, venjari hjá Stjørnuni, er avgjørdur, tá hann verður spurdur, hvussu tú steðgar Tjaldur, sum hevur verið einaráðandi seinastu mánaðirnar.

– Tú spælir, fremst av øllum, sum Stjørnan í dag. Vit hava bestu verjuna í landinum, vit eru til reiðar beinanvegin, og vit eru fyrimyndarligar í skjótálopinum, svarar hann sannførdur.

Tjaldur hevði vunnið ellivu dystur upp í slag undan vitjanini í KÍ-høllini í gjár. Stjørnan syrgdi fyri, at sigursrøðin fekk sín enda. Og tað var fult uppiborið.



*Tjaldur hevði trupult við at bróta niður sannførandi Stjørnu-verjuna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Eingin Durita

Durita Christophersen er burturstødd. Tað tóktist ikki hava stórvegis ávirkan á álopsspælið hjá Stjørnuni, tí hinar tóku ábyrgd. Una Olsen, Durita Ljósstein og Valentina Suciu vóru herovastar í gjár, og Bára Klaksstein og Alina Anghel smæddist ikki burtur.

– Tað merktist, at Durita Christophersen ikki er við, tí hon plagar at skjóta um átta mál. Hinar taka hinvegin ábyrgd, tá hon ikki er tøk, so tað er fantastiskt, sigur Svein Rógvi Nielsen.

Stjørnan hevði tamarhald á dystinum í gjár. Tær vóru við yvirlutan allatíðina, og Tjaldur royndi at togast við heimaliðið sum frægast. Gestirnir tóku fleiri skeivar avgerðir, og tær misnýttu upplagdar møguleikar. Millum annað tók Heidi Sevdal ikki av gyltu møguleikunum, tá hon var einsamøll við málverjan í tveimum reisum.

Gongdin broyttist lítið fyrstu løtuna eftir hvíldina. Tað vóru trý ella fýra mál, sum skilti liðini. Bráðliga fór heimaliðið til stroks og fekk fleiri mál upp í slag. Gestirnir tóktust skelkaðar, og høvuðsleyst gjørdu tær skjótt av í royndini at svara aftur. Tað miseydnaðist fullkomiliga, og so skrædnaði millum liðini.

### Bara í finaluna

Svein Rógvi Nielsen og Stjørnan hugsa fremst av øllum um at vinna seg í finaluna. Venjarin ger greitt, at sigurin í gjár var avgjørt eitt fet rætta vegin, men tað er framvegis sera javnt í oddinum.

– Tað eru stórskjúttarnir, sum sermerkja oddaliðini í ár. Øll liðini hava ein skjútta, sum skýtur eina rúgvu av málum. Tað verður avgerandi, at verjuspælið er sannførandi. Liðini við mest sannførandi verjuspælinum fara í finaluna, metir Svein Rógvi Nielsen.

Stjørnan vitjar StÍF, sum er botnproppur, næsta vikuskifti.

# VB hevur vind í seglunum

**HONDBÓLTUR** VB vann fyri triðju ferð upp í slag í gjár, tá Kyndil vitjaði í Vági. Sigurin var greiður og uppiborin

Uni Holm Johannesen

VB eigur ikki virkan leiklut í oddastríðnum í bestu kvinnudeildini í ár. Ikki uttan so, at vágskvinnur arga ovastu liðini. Tann leiklutin spældu tær til fulnar, tá VB vann á Stjørnuni fyri tveimum vikum síðan.

Tað hevur gingið væl seinastu umførini. VB hevur fingið seks stig av seks møguligum seinastu tvær vikurnar. Í gjár stóð Kyndil fyri tørni.

### Ymsir skjúttar

Tað vóru fleiri vágskvinnur, sum gjørdu seg galdandi í álopsstøðu í gjár. Tað tóktist ørkymlað gestirnir, sum ikki vistu, hvussu tær skuldu verja fyri heimaliðnum.

Gintave Lydekaite, seks mál, Bárað K. Mortensen, fimm mál, Gurið Mortensen, fimm mál, og Laila Jespersen, fýra mál, vóru serliga eyðsýndar í álopsspælinum.

Spurningurin varð ongantíð reistur, hvar stingini skuldu. VB var á sigurskós frá byrjan, og Kyndil rann aftaná sum frægast. Miðskeiðis í seinna hálvleiki skrædnaði av álvara millum liðini.

*uni@sosialurin.fo*

### VB – Kyndil 30-21 (14-11)

Dómarar: Kristian Joensen og Karstin Joensen

**10 min.: 4-2**
**20 min.: 11-6**
**40 min.: 19-12**
**50 min.: 24-17**

**VB:** Gintave Lydekaite 6, Bára K. Mortensen 5, Gurið Mortensen 5, Laila Jespersen 4, Rannvá Johannessen 3, Svava Vestergaard 2, Theresa Joensen 2.
**Kyndil:** Jórun Ludvig 7, Anja Heinadóttir 5, Randi Wardum 4, Heidi Maria Akselsen 2, Turið Arge 1, Súsanna Petersen 1, Anna Sofía Mohr 1.
Útvísingar: VB 5, Kyndil 5.

### Stjørnan – Tjaldur 30-23 (15-13)

Áskoðarar: 350 fólk
Dómarar: Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen

**10 min.: 6-5**
**20 min.: 11-9**
**40 min.: 21-18**
**50 min.: 24-20**

**Stjørnan:** Una Olsen 6, Durita Ljósstein 5, Valentina Suciu 5, Alina Anghel 5, Bára Klakstein 3, Judit Hansen 3, Durita Mikkelsen 2, Anna Kristina Samson 1.
**Tjaldur:** Simona Petersen 9, Adina Petrea 5, Annika Thomsen 4, Heidi Sevdal 2, Sarah Ann Thomsen 2, Jóhanna í Króki 1.
Útvísingar: Stjørnan 5, Tjaldur 1.
Reytt kort: Heidi Sevdal, Tjaldur

### Seinastu oddadystirnir:

Stjørnan, Tjaldur og Neistin togast um finaluplássini í løtuni. Átta dystir resta í. Her er yvirlit yvir, hvussu ovastu liðini spæla móti hvørjum øðrum.

2. februar: **Stjørnan – Neistin**
20. mars: **Neistin – Tjaldur**
27. mars: **Tjaldur – Stjørnan**
10. apríl: **Neistin – Stjørnan**

### Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 16 | 461 | 377 | 84 | 26 |
| 2 | Tjaldur | 16 | 453 | 374 | 79 | 25 |
| 3 | Neistin | 16 | 437 | 367 | 70 | 24 |
| 4 | VB | 16 | 395 | 389 | 6 | 17 |
| 5 | Kyndil | 17 | 398 | 415 | -17 | 13 |
| 6 | VÍF | 16 | 364 | 447 | -83 | 6 |
| 7 | StÍF | 15 | 286 | 425 | -139 | 1 |